


# Kundaráðgevi til Elektron

**Um tú vilt vera við til at menna og styrkja nýggj virkisøki í einari fyritøku, sum tøkniliga er í fremstu røð, so ert tú helst tann framfýsni kundaráðgevin sum vit nú leita eftir.**

Talan er um eitt rættiliga áhugavert og avbjóðandi starv, har tú umframt at taka tær av dagliga samskiftinum við okkara kundaskara, eisini skal vera ein virkin partur í okkara søluliði, og vera við til at styrkja okkara marknaðarstøðu.

## Um teg:

Vit ímynda okkum, at tú hevur royndir innan sølu av KT heildarloysnum, ella hevur aðrar royndir innan sølu, men sum minstakrav hevur eina breiða vitan innan almenna kunningartøkni.

Tú hevur møguliga eisini eina grundella kandidatútbúgving innan marknaðarføring, sølu ella líknandi, men hetta er tó ikki eitt krav.

Sum persónur ert tú álítandi, ágrýtin og framfýsin, og hevur evni at seta kundan í miðdepilin, so hann fær røttu ráðgeving í allari tilgongdini, frá fyrsta sambandi og til kundin hevur fingið røttu loysnina.

## Vit bjóða tær:

Sum kundaráðgevi kemur tú at vera ein partur av okkara Marknaðardeild, sum dagliga samstarvar tætt við allar partar av fyritøkuni.

Tú kanst vænta tær eitt dámligt og óformelt samskifti við tínar samstarvsfelagar og leiðarar, og vit eru øll til reiðar at stuðla tær í tínum arbeiði.

## Løn:

Lønin verður avtalað nærri í mun til tínar royndir og útbúgving.

## Umsóknir:

Umsóknir við avriti av møguligum prógvum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin 24. apríl 2008. Send umsóknina til P/f Elektron, Staravegur 9, Postboks 3219, FO-110 Tórshavn, att: Mikkel Hansen ella við telduposti til mikkel@elektron.fo.

Um tú vilt vita meira um starvið ert tú vælkomin at seta teg í samband við Mikkel Hansen, Projektleiðara, á tel 345 239.

Elektron

P/f Elektron er millum landsins størstu veitarar av KT-tænastum til fíggjarfyritøkur, almennar stovnar og vinnuvirkir. Umframt at menna skipanarloysnir, veita vit tænastur innan infrastruktur og ymiskar hosting-loysnir. 90 fólk starvast hjá P/f Elektron. Visiónin er, at okkara skipanar- og tænastuveitingar hava við sær, at kundin kann fremja framúr avrik á sínum virkisøki, samstundis sum trygdin og rakstrarstøðufestið eru í hásæti.

# Starvsfólkaleiðari

Av tí at verandi starvsfólkaleiðari fer í annað starv, verður við hesum søkt eftir nýggjum starvsfólkaleiðara at seta sum skjótast. Rætta fólkinum kunnu vit bjóða eitt avbjóðandi og áhugavert starv.

## Arbeiðsøki

Uppgávan er at leiða og standa fyri starvsfólkadeildini og áhaldandi menna starvsfólkaøkið hjá Landsverki. Tað er somuleiðis uppgávan at syrgja fyri, at vit hjá Landsverki altíð hava nøktandi HR og KT-amboð.

Starvsfólkadeildin tekur sær av bæði starvsfólkarøkt og umsiting, herundir øllum tí, sum hevur við setanarviðurskifti at gera, starvsfólkamenning, skrivstovuumsiting, frítíð, arbeiðstíð og lønarviðurskifti. Í hesum sambandi er tað eisini ein uppgáva at gera yvirskipaðar mannagongdir og reglur. Tú verður partur av leiðslubólkinum, har tíni sjónarmið kunnu gera seg galdandi.

## Førleikakrøv

Sóknast verður eftir fólki við viðkomandi hægri útbúgving og helst við leiðsluroyndum. Stórur dentur verður lagdur á góðar persónligar eginleikar, og vit rokna við, at viðkomandi hevur góð samstarvsevni, er førur fyri at eggja øðrum til og at ganga undan, er miðvísur, arbeiðir skipað og kann geva sítt íkast til at menna arbeiðsplássið.

## Setanarviðurskifti

Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.




## Umsókn

Umsókn við prógvum og lívsgongdarlýsing (CV) skal vera skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 25. apríl 2008. Merkið brævbjálvan „Starvsfólkaleiðari“. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Fleiri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Oyvindi Brimnes, stjóra, á 540 801 ella ob@lv.fo.

*Landsverk er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallarmál, herundir tyrlupallar.*

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land